# Skemt



## Hugskot til Posta

Í Suðurkorea duga øll at halda jól – ja, sjálvt postmenninir! Í hesum døgum síggja postmenn í Seoul soleiðis út, tá ið teir strúka avstað á skutarum við postinum. Upplagt, at keðiligi postbúnin í desember verður útskiftur við jólamansklæði. Hvør vil ikki hava rútkonvoluttar frá jólamanninum?




## Flúgvandi máling

Her ræður um at ansa sær. Flúgvandi, flótandi máling kann verða vandamikil – í øllum førum, um mann sendur undir henni. Men hinvegin onkur hevði sikkurt trongt til at fingið nakrar litir á sína persónligheit.

## Søgulig søga!

Tað var ikki smávegis søga, sum Sosialurin kundi bjóða lesarum sínum í ítróttinum mánadagin. Í grein um hondbóltsdystin millum Kyndil og H71 skrivar blaðið, at "Erlendur Patursson vardi málið hjá Kyndli". Nú er altso okkurt hent, sum vit á vikuskiftisredaktiónini ikki hava fingið við. Legendariski politikarin, sum fór fyri nógvum árum síðani, í málinum hjá Kyndli. Sosialurin heldur seg enn tá vita, at Erlendur stóð seg væl í málinum: "Hann varð serliga eyðsýndur, tí hann vardi fyri fleiri brotskøstum". Ja, okkum nýtist kanska ikki at siga, at málmaðurin, talan er um, eitur Erlendur Johannesen ...

## Í RANGASTRÚPAN

**Hvat er main?**
Hon, ið roykir, meðan hon er við barn, kann gera barni sínum main.
*Tubbaksráðið*

**Pedellurin fingið sáttmála?**
NSÍ leingir við lyklaleikarar
*Sportal.fo*

**Hvør?**
Endaspurturin vann dystin
*Dimma*

**Skera tað út í papp**
Einki skil á Dimmalætting
*Norðlýsið*

**Norðurkoreansku rakettirnar røkka langt**
Suðurkoreanskur trolari sokkin á suðurpóli
*Dimma*

**Hvørjum skal eg siga takk..**
... at intim rakikremið Below Your Belt til mannin og kvinnuna, sum Hans Fróði hevur skapt..
*Vikublaðið*

**Spennandi kvinnumóti í vetur**
Klæðir í neðra og hár og make-up í erva!
*Vikublaðið*

**Ssshh – varisliga!**
Mótmæla harðliga flyting av Vinnuháskúlanum
*portal.fo*

**Ungir tjóvar?**
Tóku slikkipinnar og ein pengakassa
*Vágaportalurin*

**Bara hann ikki er tómur...**
Avtala gjørd um Fulla leitibrunnin vestan fyri Hetland
*portal.fo*

## UMAFTURAFTURUM
### HØGNI DJURHUUS



# Sprokforvirringir

Kjak, kegl, var enn eina ferð herfyri um málbrúkið í Kringvarpinum.

Skulu tey, sum lesa tíðindini, sleppa at tosa sítt egna mál, sum er føroyskt, tosa sítt bygdarmál? Hvalbiarmál er líka føroyskt sum Havnarmál ella Klaksvíksmál.

Ella skulu øll lesa og spyrja á ríkismálinum, sum jú er danskt?

Tvætl. Óneyðugt kegl. Allir føroyingar skilja øll føroysk málbrigdi. Tey, sum siga seg ikki gera tað, gera seg upp. Her krevjast ongar broytingar. Lat vera sum er.

Ein dialekt varð tó ongantíð nevnd, sportsdialektin, ítróttarmálið.

Tað málbrigdið er vert at steðga á við eina løtu, taka eitt timeout. Allir føroyingar skilja, sum júst nú staðfest, øll føroysk málbrigdi. Allir føroyingar skilja danskt.

Men eg ivist í, at allir føroyingar skilja ítróttarmálið.

Tá til dømis eitt lið er flúgvandi, er ikki endiliga talan um eitt flogbóltslið. Ella eitt lið, sum er á veg av landinum í flogfari. Eitt fótbóltslið til dømis kann vera flúgvandi. Ísini telvarar flúgva, tá væl stendur til og rætt er flutt, og luftin tikin úr mótleikaranum.

Fáa teir einki at eta, neyðars menn, spurdi ein gomul kona. Hon hevði nakrar ferðir hoyrt í radioIurtinum, at fótbóltsspælarar vóru svangir, tá teir skuldu í eldin í enn einum oddabraki.

Nógvir útlendingar eru í føroyskum handbólti. Tí eru nøkur lið farin at spæla indianarabólt

Og so allir hasir bóltarnir. Adidas vann kappingina um bóltin til seinastu heimsmeistarakapping í fótbólti, tí eingin annar kláraði at gera ein rundan bólt, sum ikki var til rundbólt. Hinir bóltarnir vóru antin ov langir, ov høgir ella diagonalir.

Tey, sum vita alt grundleggjandi, sum vert er at vita um fótbólt, og tað er ikki so lítið, vita sjálvandi, at tann, sum vinnur ein dyst, fær trý stig fyri tað - á kontuna, eitur tað vist. Men viðhvørt verður tosað um seksstiga, ella seksstigs dystir, fyri ikki at svíkja ítróttarforvirringin um eintal og fleirtal.

Lítil, ja, eingin munur er á eintali og fleirtali á ítróttarmálinum.

EB/Streymur eitur ikki so, men EB/Streymar, tí EB/Streymsverjan eitur EB/Streymaverjan, EB/Streymsliðið er EB/Streymaliðið, teir eru jú 11 í senn.

Kyndilsmenn eru Kyndlamenn og Kyndilskvinnur er Kyndlakvinnur.

Víkingsálopið er Víkingaálopið ella bara Gíálopið, tá heilt væl stendur til.

Eingin hugsar um mál, tá mál er skorað.

Men sportsdialektin hevur sjálvandi sama rætt sum øll onnur málbrigdi á málstrikuni.

Tí føroyskt er við at gerast eitt rættiliga monotont mál. Tí er harðliga brúk fyri øllum, sum kann peppa málið upp, meðan bendingar hvørva, og eintal er fleirtal og øvugt, sum best ber til eftir behag.

Yvirskipaða málið hjá føroyska málinum er vónandi at hava málið livandi. Og málið er livandi, tí hvør hevur sítt mál.

Tað ræður ikki um á hvørjum bygdarmáli tíðindini eru, men um tíðindini eru verd at lurta eftir. Og tað er eitt heilt annað og nógv størri mál, sum ikki hevur so stóran áhuga sum oy fyri ei.

Kanska er setursføroyskt bara eitt málbrigdi, ein dialekt, eitt bygdarmál.

Lollipop er ein sleikisneis. Ein spritubiti er ikki ein sleikisneis, ikki soleiðis at skilja, men pinnamatur.

Og tá stjórnarskipanin kemur um hálva aðru øld ella so, verður hon í trimum útgávum, minst:

Vit, fólkið í Føroyum....

Okur, fólkið í Føroyum....

Vitttttt, fólkið í Føroyum....